## Start ger ikki meira við David

Danski álopsspælarin David Nielsen, sum Todi Jónsson áður hevur spælt saman við í FCK, var herfyri í Start og hugdi eftir umstøðunum. David Nielsen hevur ongan sáttmála til eftir summarsteðgin, og nú leitar hann eftir nýggjum felag. Tað verður tó neyvan Start, sum hann skal spæla fyri, tí ítróttarstjórin í felagnum heldur ikki, at Start hevur ráð til hann.

- Fleiri feløg liggja fram við eftir honum, og vit eru ikki felagið við teimum flestu pengunum, so eg rokni við, at hann verður ov dýrur til okkum, sigur Trond Are Gjone.

Ítróttarstjórin kann ikki lova, at Start fer at styrkja hópin hjá sær í summar, tí hann veit ikki, hvussu nógvar pengar, hann fær at ráða yvir til nýggjar spælarar beint nú.




## Watford í Premier League

Sunnudagin var finalan um uppflyting til Premier League spæld í Cardiff. Watford og Leeds spældu ímóti hvørjum øðrum, og hetta eru tvey feløg, sum áður hava spælt nógv í bestu ensku fótbóltsdeildini. Dysturin sunnudagin endaði eitt sindur óvænta við, at Watford vann 3-0. Teir komu á odda 1-0 í hálvleikinum, og so hvørt sum Leeds satsaði meira fyri at javna, økti Watford um leiðsluna. Tað eru liðin seks ár, síðani Watford seinast spældi í Premier League.

## Taptu tvey og vunnu eitt

Úrslitið var 1-1 og eitt stig í part. Men lagið var heilt ymiskt í KÍ og GÍ legunum, tá ið stríðið var lokið.

– Vit ætlaðu okkum at fáa stig við til hús aftur. Leingi sá tað einki út, men vit høvdu góðan hugburð og stríddust fyri søkini, og stútarin hjá Sverra Jacobsen var fínur, staðfestir væl nøgdi GÍ miðvallarin Hanus Jacobsen, sum heldur, at uppgerðin átti ikki at verið spæld í gjár:

– Vindurin var nógvur, og tilvildin hevði stórt árin. Eitt nú tá ið teir fingu mál, var vindurin nógv uppií.

GÍ skal næstu vikurnar spæla móti VB/Sumba, B68 og ÍF.

– Á pappírinum kundi hetta sæð út at verið lættari dystir, enn teir vit hava spælt seinastu vikurnar. Men vit hava fokus bara á næstu uppgávuni, og hon er steypardysturin í Klaksvík hósdagin, sigur GÍ miðvallarin.

Millum klaksvíkingarnar var lagið einki serligt. KÍ kendi seg at havaz mist tvey stig í staðin fyri at hava vunnið eitt.

– Veðrið var soleiðis, at tað ikki bar til at spæla rættuligan fótbólt. Men tað kunnu vit ikki brúka til nakað nú. Vit høvdu fleiri møguleikar at gera mál – bæði í 1. og 2. hálvleiki. Tað megnaðu vit ikki, og tí kunnu vit illa leggja orsøkina fyri mistu stigunum nakra aðra staðni enn á okkum sjálvar, heldur KÍ miðvallarin Símun Joensen.

Eftir steypadystin hósdagin skal KÍ longu leygardagin spæla landskappingardyst á Norðoyastevnu ímóti B36.

– Vit hava mist seks stig á heimavølli í trimum teimum fyrstu royndunum. Tað er ikki nóg gott, og nú verður avbjóðingin eins stór, sum hon var hesa ferð.

KÍ-GÍ 1-1 (1-0):

# Klaksvíkingar vóru vónbrotnir

*KÍ*

*GÍ*

**GÍ spenti álopsbogan í botn síðstu løtuna, og tá eydnaðist teimum at javna, eftir at teir høvdu verið væl við í spælinum úti á vøllinum, meðan heimaliðið hevði átti uppløgdu málmøguleikar, sum vórðu misnýttir**

KÍ-GÍ
*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar hingu við høvdinum, og gøtumenninir fegnaðust, tá ið dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð í Klaksvík.

Hetta var ikki so undarligt. KÍ legði seg á odda longu í 5. minutti, og teir hildu leiðsluna, inntil vanliga leiktíðin var farin. Tá javnaði GÍ, sum í útgangsstøðuni bara hevði Gunnar Nielsen á toppinum, meðan Hans Jørgen Djurhuus lá nakað aftanfyri hann og frammanfyri hinar miðvallararnar.

Síðsta korterið høvdu gøtumenn framt tríggjar álopskendar útskiftingar – Áslakur R. Petersen endaði á vinstra vongverja, har hann ikki áður hevur spælt – og hetta vísti seg at vera gott hugskot. Málskjútti hjá GÍ var innskifti Sverri Jacobsen. Hann var púra leysur mitt fyri málinum, tá ið hann við høvdinum stýrdi frísparksinnleggi úr vinstru frá liðformanninum Sámali Joensen upp um KÍ málverjan og í kassan.

Atli Danielsen átti síðsta fótin á KÍ málinum, eftir at hornaspark var lagt innfyri. Tá hevði KÍ havt onkran møguleika, og tað hevði einki forgjørt verið í tí, um heimaliðið hevði økt um leiðsluna, áðrenn trýstið undan vindinum linkaði eitt sindur.

Umstøðurnar vóru ikki til at spæla fótbólt í Klaksvík. Høgættin var øgilig, og hvørki av liðunum megnaðu at fáa tak á bóltinum og spælinum.

Paul Clapson, sum hevur verið fremsti KÍ álopsspælarin, var bæði leikbannaður og skaddur. Sinisa Jovanovic, sum higartil hevur verið verjukendur miðvallari ella kanska heldur miðverji, var fremsti maður. Konseptið tóktist vera, at hann við høvdinum skuldi stýra høgu framleggingunum í borðini til Harley Bertholdsen og Heðin á Lakjuni.

Hóast teir beinanvegin fingu eitt mál ímóti sær, so vóru gøtumenn væl við í spælinum. Teir høvdu bóltin eins nógv og heimamenninir høvdu, men tað gekk striltið hjá teimum at spæla seg til uppløgdar málmøguleikar. Meinhardt Joensen í KÍ málinum var sera vakin, tá ið teir royndu at spæla fram ímillum, og fleiri langskotsroyndir vóru lítið neyvar – eisini tí at váti vøllurin og vindurin órógvaðu nógv.

### Fleiri møguleikar

KÍ var meiri miðvíst og søkjandi í álopsspælinum, og fleiri ferðir var um reppið, at KÍ fekk mál. Men GÍ hevur í Geza Turi framúr góðan málverja. Einki er at tosa um, at tað var hann, sum átti sera stóran lut í, at tað eydnaðist GÍ at koma burturúr illveðrinum í Klaksvík við einum stigi.

Fleiri ferðir var ungverski málverjin sannur brandur, og onkra ferðina var hepnið eisini við honum. Eitt nú tá ið Hjalgrím Elttør úr góðari støðu sendi í stólpan, meðan málverjin mest sum negldur stóð og hugdi at, tá ið bólturin umvegis stólpan rullaði millum beinini á honum og aftur í spæl, og tá ið skotroynd hjá Símuni Joensen rakti í ein av verjuspælarunum, snýtti málverjan, sum akkurát fekk fingrarnar á, so bólturin sigldi á tvørtræið.



*Veðrið var av tí allarringasta, men bæði spælarar og dómari gjørdu av at royna, og varð dysturin í Klaksvík hóast alt avgjørdur* *Mynd: Álvur Haraldsen*

Kristoffur Jacobsen hevur ikki fingið nógva spælitíð á besta KÍ liðnum í ár. Síðstu løtuna loysti hann Harley Bertholdsen av í høgra borði. Kristoffur gjørdist leysur, eftir at hann hevði fingið bóltin stungnan fram ímillum, men GÍ málverjin vann tvídystin teirra millum, og so fegnaðust GÍ spælararnir og viðhaldsfólkini.

GÍ hevði fingið tað burturúr, sum teir vóru komnir eftir. Gøtumenn høvdu sera góðan hugburð. Tað kendist sum vátur klútur, tá ið teir beinanvegin fingu mál ímóti sær, men teir góvust ikki á hondum. GÍ liðið, sum sammett við í fjør er hamskift, stríddi seg til eitt stig, og um teir høvdu havt verið heilt hepnir, so høvdu teir eisini havt skorað eitt mál afturat. Men tað hevði havt verið mest sum ov nógv av tí góða!

KÍ hevur stórar ætlanir. Um tær skulu gerast til veruleika, so skulu teir í Klaksvík fáa meiri burturúr á heimavølli, enn teir higartil hava gjørt. Javnleikurin móti GÍ var tann triði í hesum kappingarárinum. KÍ hevur bara vunnið á heimavølli móti VB/Sumba!

GÍ hevur bara tapt á útivølli móti oddaliðnum á Eiði. Javnleikurin móti KÍ var tann triði á útivølli.